Føroya
fso Symfoniorkestur

# Viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin
# Føroya Symfoniorkestur

## § 1
## Navn og heimstaður

Føroya Symfoniorkestur
Postrúm 1170
FO – 110 Tórshavn
www.fso.fo fso@fso.fo

## § 2
## Endamál

Føroya Symfoniorkestur er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at reka symfoniorkestur á høgum stigi og við konsertum og øðrum tónleikaligum virksemi at nøra um og styrkja ansin fyri tónleiki og við hesum gera tónleikalívið her á landi fjølbroytt og dygdargott.

Stk. 2. Orkestrið hevur serliga skyldur mótvegis føroyskum tónleiki og eigur regluliga at framføra føroysk ella føroyskt íblást verk.

Stk. 3. Orkestrið skal miða ímóti at røkka øllum aldursbólkum kring alt landið. Hetta kann verða gjørt við árligum barna- og nýggjárskonsertum.

## § 3
## Stýrið

Sjálvsognarstovnurin verður stjórnaður av einum stýri við seks limum. Stýrið er samansett soleiðis:

Landsstýrismaðurin í mentamálum tilnevnir ein lim, sum er formaður, og ein tiltakslim fyri formannin,

Norðurlandahúsið tilnevnir ein lim og ein tiltakslim,

Tórshavnar kommuna tilnevnir ein lim og ein tiltakslim,

Kringvarp Føroya tilnevnir ein lim og ein tiltakslim, og

tónleikararnir í Føroya Symfoniorkestri velja tveir limir og tveir tiltakslimir.

Stjórin fyriskipar valið, tó soleiðis at fráfarandi formaðurin í symfoniorkestrinum skipar fyri fyrsta valinum.

Stk. 2. Miðað eigur at verða ímóti, at stýrið verður sett saman, so at ásetingarnar um nevndir og ráð í løgtingslóg um javnstøðu verða fylgdar.

Stk. 3. Setanarskeiðið hjá stýrinum er fýra ár og gongur frá 1. desember til 30. november. Skrivarin í stýrinum, sum er stjórin, fyriskipar tilnevning av limum og tiltakslimum í stýrið.

## § 4

Stýrið hevur yvirskipaðu ábyrgdina av fíggjarviðurskiftum og rakstri hjá Føroya Symfoniorkestri. Stýrið skal harumframt virka fyri, at orkestrið hevur tryggar karmar og áhaldandi kann mennast.
Stk. 2. Vanligar rættarreglur um endurgjald eru galdandi fyri stýrislimir, sum tó ikki hefta persónliga fyri fíggjarligu skyldurnar hjá sjálvsognarstovninum.
Stk. 3. Stýrið setir stjóra fyri Føroya Symfoniorkestur. Starvið er tíðaravmarkað til fýra ár og kann verða longt fyri fýra ár í senn.
Stk. 4. Stýrisformaðurin og stjórin tekna sjálvsognarstovnin í felag. Um so er, at formaðurin hevur forfall, tekur tiltakslimurin fyri formannin við í hansara stað.
Stk. 5. Stýrið setir høvuðsdirigent í tíðaravmarkað skeið eftir tilmæli frá samstarvsnevndini.
Stk. 6. Styrið setir konsertmeistara eftir tilmæli frá samstarvsnevndini.

## § 5
## Tónlistarliga leiðslan

Tónlistarliga leiðslan fyri orkestrið er stjórin, høvuðsdirigenturin og konsertmeistarin.
Stk. 2. Leiðslan setir bólkaleiðarar fyri ymsu ljóðførini.

## § 6
## Fundarskipan

Stýrið fyri Føroya Symfoniorkestur ger sjálvt sína fundarskipan.
Stk. 2. Stýrisformaðurin kallar inn til stýrisfund í minsta lagi tvær ferðir um árið, og tá ið tað verður hildið neyðugt. Fundarboðini skulu verða skrivlig og givin í góðari tíð.
Stk. 3. Stjórin er skrivari hjá stýrinum og førir á hvørjum stýrisfundi gerðabók, sum møttu stýrislimirnir undirskriva, eftir at fundurin er lokin.
Stk. 4. Stýrið er viðtøkuført, tá ið í minsta lagi fýra limir eru møttir. Avgerðir í stýrinum verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur atkvøðugreiðslan á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.
Stk. 5. Fundarpeningur verður goldin sambært reglum landsins um nevndarsamsýning. Ferðaútreiðslur verða endurgoldnar sambært reglum um tænastumenn landsins. Beinleiðis útreiðslur, ið standast av stýrisarbeiðinum, verða endurgoldnar ímóti skjalprógvum.

## § 7
## Uppgávur hjá stjóranum

Stjórin hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum hjá orkestrinum. Stjórin hevur mótvegis stýrinum ábyrgdina av fíggjarviðurskiftum, marknaðarføring, listarligu leiðsluni og fyrisitingini.
Stk. 2. Stjórin ger á hvørjum ári fíggjarætlan fyri komandi tónleikaár, sum verður send stýrinum at góðkenna í seinasta lagi 1. juni.
Stk. 3. Stjórin mannar orkestrið í samráð við samstarvsnevndina.

Stk. 4. Stjórin kann í samráð við samstarvsnevndina seta ein verkætlanarleiðara til at taka sær av einstøkum verkætlanum.
Stk. 5. Stjórin kann seta hjálparfólk til pallin og onnur praktisk viðurskifti í sambandi við venjing og konsertir.

## § 8
## Tónleikanevndin

Ein tónleikanevnd hevur saman við stjóranum listarligu leiðsluna av orkestrinum.
Stk. 2. Tónleikanevndin leggur uppskot um skrá fyri konsertir og ger av, hvørji tónlistaverk skulu framførast. Tónleikanevndin kann ráðføra seg við umboð fyri tónleikabólkar í orkestrinum. Um tónleikanevndin er ósamd, hevur stjórin avgerðarrættin.
Stk. 3. Í tónleikanevndini eru tríggir limir:
Konsertmeistarin, sum er formaður og skrivari,
høvuðsdirigenturin og
eitt umboð fyri tónleikararnar í orkestrinum, sum verður valt fyri 4 ár í senn.
Stjórin fyriskipar valið.

## § 9
## Samstarvsnevndin

Samstarvsnevndin er ráðgevandi nevnd hjá leiðsluni, hvørs endamál er at tryggja eitt gott og skipað arbeiði í leiðsluni og gott samskifti við orkesturlimirnar.
Stk. 2. Samstarvsnevndin kann gera tilmæli til tónlistarligu leiðsluna um eitt nú hjálpardirigentar og tiltøk.
Stk. 3. Í Samstarvsnevndini eru átta limir, sum virka sum millumlið millum leiðslu og orkesturlimir.
Umframt tónlistarligu leiðsluna, stjóran, høvuðsdirigentin og konsertmeistaran, velja føstu limirnir sínámillum í samstarvsnevndina
eitt umboð fyri violinirnar,
eitt umboð fyri hinar strúkararnar,
eitt umboð fyri messingblásarar,
eitt umboð fyri træblásarar og
eitt umboð fyri slagverk, klaver, harpu o.a.
Stk. 4. Samstarvsnevndin skipar seg við formanni. Stjórin er skrivari.

## § 10
## Roknskapur og fígging

Roknskaparár orkestursins er álmanakkaárið, og roknskaparreglur landsins skulu fylgjast. Roknskapur verður grannskoðaður av góðkendum grannskoðara. Stýrið letur í seinasta lagi 1. mars landsstýrismanninum grannskoðaðan roknskap og ársfrágreiðing fyri undanfarna ár.

Stk. 2. Føroya Symfoniorkestur kann móttaka stuðul úr landskassanum, frá kommunum, stovnum og øðrum. Orkestrið kann eisini útvega sær pening við tiltøkum av ymiskum slag og frá privatum stuðlum.
Stk. 3. Aktivir hjá verandi Føroya Symfoniorkestri verða flutt uttan viðurlag til sjálvsognarstovnin Føroya Symfoniorkestur.

## § 11
## Keyp og søla av ognum

Til at keypa og selja fasta ogn ella veðhalda krevst, at í minsta lagi tríggir stýrislimir atkvøða fyri avgerðini, millum teirra stýrisformaðurin.
Stk. 2. Verða ognir keyptar, latnar ella settar í veð, verða lán tikin, panting ella onnur trygd givin, ella verður prokura givin, krevst, at í minsta lagi tríggir stýrislimir skriva undir, millum teirra stýrisformaðurin.

## § 12
## Viðtøkubroytingar og avtøka

Broytingar kunnu bara verða gjørdar í viðtøkunum, um í minsta lagi fýra stýrislimir atkvøða fyri. Landsstýrismaðurin skal góðkenna viðtøkubroytingarnar.
Stk. 2. Verður Føroya Symfoniorkestur tikið av, skulu í minsta lagi fýra stýrislimir atkvøða fyri. Landsstýrismaðurin skal góðkenna avgerðina sambært hesi áseting.
Stk. 3. Møguligt avlop og avhending av ognum hjá Føroya Symfoniorkestri í sambandi við avtøku verða nýtt til eitthvørt tónleikaendamál eftir góðkenning landsstýrismansins.

## § 13
## Gildiskoma

Viðtøkurnar hava gildi frá 26. november 2018.

Føroya
fso Symfoniorkestur

Soleiðis samtykt á stovnandi fundi í Mentamálaráðnum mánadagin 26. november 2018

**Mentamálaráðið**

Rigmor Dam, landsstýriskvinna

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

Gunn Hernes, stjóri

**Tórshavnar kommuna**

Annika Olsen, borgarstjóri

**Kringvarp Føroya**

Ivan Niclasen, stjóri

**Føroya Symfoniorkestur**

Poul Jákup Thomsen, formaður